# Tangar til alislógv

**Seks stórir tangar til at goyma alislógv í, er komnir til Eiðis, har teir verða settir upp við virkið hjá Salmon Proteins, sum fer at viðgera slógvið, áðrenn tað verður útflutt**

ALIVINNA
*Edvard Joensen*



**Eiði:** Seks rættiliga stórir tangar komu um dagarnar til Eiðis. Teir eru keyptir úr Noreg og Svøríki og vórðu fluttir higar á einum prámi, sum ein sleipibátur hevði afturút.

Teir verða settir upp sunnan fyri virkisbygningin hjá Salmon Proteins, sum fer at viðgera slógv frá alifiski. Bæði fra sjúkum fiski og tað, sum kemur frá frískum fiski.

Jógvan Emil Nielsen, stjóri á Salmon Proteins, sigur, at teir hava keypt hesar tangarnar brúktar, tí tað er rættiliga stórur munur á tí og at gera nýggjar tangar. Men hann leggur dent á, at eingin ivi er um, at tanganrir eru tryggir.

Fýra av tangunum rúma umleið fimmhundrað rúmmetrum, og hinir báðir umleið tveyhundrað rúmmetrum hvør.

–Tað er umleið sama tal í tonsum, greiðir Jógvan Emil Nielsen frá.

Umframt at hava umhvørvisligar fyrimunir við sær, fer virkið eisini at hava aðrar fyrimunir, sigur stjórin. Teir fara at savna slógvið, sum so kann flytast av landinum í stórum nøgdum. Tað fer at bera til at fáa heil tangskip í senn og ikki sum nú, tá hvør einstakur alari sendir smá kør við slógvi av landinum. Fyrimunurin við flutningskostnaðinum verður eyðsýndur, sigur Jógan Emil Nielsen.

Virkið fer væntandi í gongd heilt skjótt. Í grundini er klárt, tá tangarnir eru settir upp, sigur stjórin.

Tað er lastbilafyritøkan hjá Hans Egili Joensen og synum á Eiði, sum hava fingið uppgávuna at savna slógvið kring landið og koyra tað til Eiðis. Til tess hava teir fingið sær serútgerð.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk og regn av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi ella av ymsum ættum. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 23 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | -- |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 29 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 17 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1003 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing eystan og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1001 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist nakað.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/07 kl. 06⁰⁰– 22/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 21/07 kl. 06⁰⁰–22/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 53,0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. juli | 03.08 | 15.27 | 02.08 | 14.27 | 02.23 | 14.42 | 05.08 | 17.27 | 06.08 | 18.27 | 01.23 | 13.42 | 00.23 | 12.42 | 03.23 | 15.42 | 04.23 | 16.42 | 02.53 | 15.12 | 04.08 | 16.27 |
| 24. juli | 03.47 | 16.07 | 02.47 | 15.07 | 03.02 | 15.22 | 05.47 | 18.07 | 06.47 | 19.07 | 02.02 | 14.22 | 01.02 | 13.22 | 04.02 | 16.22 | 05.02 | 17.22 | 03.32 | 15.52 | 04.47 | 17.07 |
| 25. juli | 04.28 | 16.50 | 03.28 | 15.50 | 03.43 | 16.05 | 06.28 | 18.50 | 07.28 | 19.50 | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 04.13 | 16.35 | 05.28 | 17.50 |
| 26. juli | 05.13 | 17.36 | 04.13 | 16.36 | 04.28 | 16.51 | 07.13 | 19.36 | 08.13 | 20.36 | 03.28 | 15.51 | 02.28 | 14.51 | 05.28 | 17.51 | 06.28 | 18.51 | 04.58 | 17.21 | 06.13 | 18.36 |
| 27. juli | 06.01 | 18.26 | 05.01 | 17.26 | 05.16 | 17.41 | 08.01 | 20.26 | 09.01 | 21.26 | 04.16 | 16.41 | 03.16 | 15.41 | 06.16 | 18.41 | 07.16 | 19.41 | 05.46 | 18.11 | 07.01 | 19.26 |

5 707265 100036 >